Løgmannabreyt, tann 15. novembur 2017

Góðu næmingar og foreldur

Nú nærkast jólini, og sum vant eru onkrar broytingar í tímatalvuni. Her er eitt yvirlit yvir skúlagongdina í desembur mánað og kunning um, nær jólahaldið verður.

Fríggjadagin 1. desembur	1. - 4. tíma gera vit jólaprýði og prýða skúlan. Allir næmingar eiga at hava saks og límstift við í skúla. Vanlig undirvísing er eftir 4. tíma. Kl. 15-17 er tiltakið "Í menniskjum góður tokki" í skúlanum. Næmingar hava gjørt ymiskt at selja, lutaseðlasøla verður, og myndirnar frá myndatøkuni kunnu avheintast.
1. – 15. desembur	Morgunsangur verður í námsfrøðiliga deplinum hvønn dag kl. 9.15.
4. -15. desembur	Vanlig undirvísing.
Mánadagin 18. desembur	Vit leggja síðstu hond á jólaframførslurnar. 1. – 2. flokkur møtir eftir vanligu tímatalvuni og fer síðani í frítíðarskúla. 3. – 9. flokkur møtir klokkan 8.00-12.35. 3. flokkur hevur hugnaløtu í skúlanum til kl. 13.20, tá frítíðarskúlin letur upp.
Týsdagin 19. desembur	Allir flokkar møta kl. 8.00 í skúlanum. Vit venja til jólahaldið og hava frumframførslu. Øll fáa frí kl. 11.20, tó hava tey, sum skulu í frítíðarskúla hugnaløtu í skúlanum til kl. 13.20, tá frítíðarskúlin letur upp. Jólahald verður fyri næmingum, foreldrum og systkjum klokkan 16.00-18.00 Í desembur mánað fáa tit meira kunning um jólahaldið.
Mikudagin 20. desembur	Øll møta kl. 8.00 í skúlanum. Kl. 9.00 fara vit til jólaguðstænastu í Hoyvíkar kirkju. Tá jólaguðstænastan er liðug, fara øll niðan í skúlan aftur til jólatræ fyri næmingum og lærarum í 1. – 9. flokki. Í ár fara vinarflokkarnir at dansa jólatræ saman. Øll hava frí kl. 11.20, tó hava tey, sum skulu í frítíðarskúla hugnaløtu í skúlanum til kl. 13.20, tá frítíðarskúlin letur upp.

Blíðastu jólaheilsanir
Skúlin við Løgmannabreyt